# Uni og teir tola ikki at tapa

***Ísland**: Sigur í steypafinaluni skal bjarga kappingarárinum bæði á Akranesi og í Vestmannaoyggjunum*



*Vónandi verður tað gull, sum íslendski forsetin fer at handa Una Arge, tá hann á ørðum sinni skal royna seg móti ÍBV í íslendsku steypafinaluni*

Í morgin fer Uni Arge á tjóðarvøllin hjá íslendingum, Laugardalsvøllin í Reykjavík, at spæla steypafinalu. Mótstøðuliðið hjá ÍA er ÍBV úr Vestmannaoyggjunum. Felags fyri bæði liðini er, at tey eru sigursvand, og at hvørki teirra er nøgt við endastøðuna í landskappingini. Bæði liðini hava vunnið meistaraskapin fleiri ferðir, og bæði liðini hava vunnið steypakappingina fleiri ferðir. Endastøðan í landskappingini í ár bar hvørki hjá ÍA ella ÍBV pláss í Europa Cup við sær. Tí stendur serliga nógv upp á spæl í morgin.

– Felagið hjá okkum vil so fegið vera við í Europa Cup. Tað vilja teir í ÍBV eisini. Tað er greitt frammanundan, at bara annar parturin fær gjørt dreymin til veruleika, og vit ætla okkum at vinna.

Hetta sigur Uni Arge, sum eisini komandi kappingarár hevur sáttmála við felagið í Akranesi. At spæla finalu á Laugardalsvøllinum er ikki ókent fyri Una. Í 1998 vóru hann og Jens Martin Knudsen partur av Leifturs liðnum, sum tapti 2–0 ímóti júst ÍBV.

– Ta ferðina hildu vit okkum hava møguleika at vinna. Men vit mistu ein mann, tá ein hálvur tími var farin, og so taptu vit 2–0. Í ár verður ÍBV mett at vera lítil favorittur. Men alt skal avgerast ein og sama leikdag, so alt kann henda.

### Nógvar royndir

Akranes var í finaluni í fjør, men tá taptu teir ímóti KR. Annars hevur Akranes stolt steypahagtøl at vísa á. Teir vunnu finaluna fyrstu ferð í 1978. Síðani tá hava teir vunnið seks ferðir: í 1982, 1983, 1984, 1986, 1993 og í 1996.

Fyrsta finalan var í 1960, og tað royndist illa nógvu tær fyrstu ferðirnar, Akranes var í finaluni. Teir taptu átta ferðir, áðrenn tað í 1978 eydnaðist at vinna: í 1961, 1963, 1964, 1965, 1969, 1974, 1975 og í 1976.
ÍBV hevur eisini verið í nógvum finalum, og viðurskiftini líkjast rættuliga nógv í Vestmannaoyggjunum og á Akranesi. Íslendsku fjølmiðlarnir tosa ofta um eyjamenn og skagamenn, og fótbólturin hevur nógv at siga í báðum støðunum:

– Hvat fólkatalinum viðvíkur, og tá tað snýr seg um áhugan fyri fótbólti og fiskivinnu, minnir Akranes nógv um tað, sum plagar at verða sagt um Klaksvíkina. Eg havi skilt, at tað er á sama hátt í Vestmannaoyggjunum. Nógv higani av plássinum koma til Reykavíkar at stuðla okkum, og nógv úr Vestmannaoyggjunum fara at stuðla teirra liði. Tey rokna við, at áskoðaratalið fer at liggja millum fýra og fimm túsund, sigur Uni Arge.

### Soltið kappingarár

Í heyst hevur Uni Arge verið sera væl fyri. Bæði á landsliðnum og í Íslandi, har hann hevur skorað fleiri avgerandi mál:

– Eg havi spælt fótbólt í nógv ár, og eg havi verið heppin soleiðis at skilja, at eg ongantíð áður havi verið langtíðarskaddur. Tað havi eg verið í ár, og tað hevur kenst rættuliga frustrerandi, sigur Uni Arge, sum var burtur frá fótbóltinum í tíggju vikur.

– Nú er finalan á skránni, og um tað eydnast okkum at vinna, so fer alt annað í bakgrundina. Mín uppgáva er at skjóta mál í ÍA. Eg kenni ikki, at eg havi havt møguleikar at skorað tey málini, sum eg hevði vónað, og sum tey í felagnum høvdu roknað við. Men finalan er ein einastandandi møguleiki, heldur Uni Arge.

Tey seinnu árini hevur ÍA liðið síðsta samdøgurið undan finalunum hildið til á einum gistingarhúsi í Hveragerði. Tað gera teir eisini hesa ferð. Ferðin av Akranesi og til Reykjavíkar tekur einar 40 minuttir. Tá verður ferðast gjøgnum tunnilin undir Hvalfirði. Í dag fara Uni Arge og liðfelagarnir henda túrin. Í morgin fara nógv viðhaldsfólk av Akranesi sama veg. Vónin hjá teimum øllum er, at tey sunnukvøldið kunnu fara til hús aftur við steypinum og atgongumerkjunum til UEFA Cup.

– Tað hevði verið fantastiskt, sigur Uni Arge, sum mánadagin kemur til Føroya. Hann ætlar at gera nógv við venjingina, so hann verður væl fyri, tá landsliðið um tvær vikur fer til Sveis og Jugoslavia.

JH

## FCK skal spæla í Brøndby

*Og Herfølge skal spæla steypadyst á útivølli ímóti FCMidtjyllandi*

Nú er tað greitt, hvør skal spæla ímóti hvørjum í áttandapartsfinalunum í donsku steypakappingini.

Lutakastið lagaði tað soleiðis, at Todi Jónsson og FCK skal spæla á útivølli í Brøndby. Síðst hesi bæði stórfeløgini í høvuðsstaðnum hittust í steypadysti var Kristi himmalferðardag í 1998. Tá vann Brøndby finaluna í Parkini 4–1. Fleiri enn 40 túsund áskoðarar vóru og hugdu at.

So nógvir áskoðarar fara ikki at møta upp í Brøndby mikukvøldið 8. november, men í donskum fjølmiðlum er eingin ivi um, at hetta verður mest áhugaverdi dysturin í fimta umfarinum.

Jákup Mikkelsen og hinir í Herfølge skulu til Jyllands, har mótstøðuliðið verður nýggja felagsliðið hjá Ikast og Herning. Tað eitur FC Midtjylland. Hetta liðið er á triðja plássi í superliguni. Tað boðar frá, at uppgávan hjá Herfølge verður ivaleysa stór.

Johan B. Hansen og OB skulu eisini spæla á útivølli. Teir skulu um brúnna um Lítla beltið og norður til Viborg.

Hinir dystirnir eru hesir: Vejle–AB, AaB–Silkeborg, Ballerup–FS Aarhus og Holsterbro–Esbjerg. Tað er ikki greitt enn, hvør skal spæla síðsta dystin. Horsens skal hava heimavøll. Gestirnir koma úr B93 ella Lyngby. Tey bæði keypmannahavnarliðini skulu spæla komandi mikukvøld.

JH

## U 16 landsliðið úttikið

*18 leikarar eru úttiknir til U 16-landsliðið, sum fer av landinum sunnudagin*

Jákup Mørk

Liðið, sum skal luttaka í undankappingini til EM, fer úr va´gunum nú sunnudagin, og longu týsdagin verður fyrsti dysturin á ferðini, tá Føroyar skulu spæla móti Hvítarusslandi.

Hósdagin verður dystur móti vertslandinum, Holland, og leygardagin verur so seinasti dysturin hjá føroyingum, og verður hesin móti Íslandi.

Teir 18 leikararnir, sum hava fingið landsliðsboð eru: Sámal J. Samuelsen, Marni Djurhuus, Hans Pauli Samuelsen EB/Streymur, Arnfinn í Bartalsstovu GÍ, Áki Petersen, Hanus Eliasen ÍF, Eli Thorsteinsson, Rani D. Christiansen, Bjarni Jørgensen, Rókur F. Jespersen HB, Ingi Højsted, Mortan Johannesen B36, Aksel Petersen, Jann Ingi Petersen B68, Rasmus Nolsøe TB, Magnus Skoralíð LÍF, Andy Olsen, Bjarki Danielsen NSÍ. Við í ferðalagnum eru eisini Jógvan Martin Olsen, Mathias Davidsen Pætur Clementsen, Fanny Kruse og Jón Harald Poulsen.

## Eingin broyting

*Allir 18 landsliðsleikararnir, sum vóru á Svangaskarði seinast, eru við í ferðalagnum, sum fer til Sveis og Jugoslavnia*

Jákup Mørk

Landsliðsvenjarin, Allan Simonsen, hevur nú gjørt av, hvørjir teir 18 verða, sum fara við á komandi landsliðsferðina.

Vanliga er landsliðsvenjarin ikki maðurin, sum fremur tær stóru kollveltingarnar í so máta, og soleiðis er heldur ikki hesu ferð.

Sæð í ljósinum av úrslitinum á Svangaskarði var heldur ikki væntandi, at talan skuldi gerast um tær stóru broytingarnar.

Hópurin er annars hesin:Jóhannis Joensen, Allan Mørkøre HB, Henning Jarnskor GÍ, Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen B68, Jens Kristian Hansen B36, Rógvi Jacobsen KÍ, Jens Martin Knudsen, Sámal Joensen, John Petersen Lieftur, Óli Johannesen AGF, Todi Jónsson FCK, Julian Johnsson, Kurt Mørkøre, Hans Fróði Hansen Sogndal, Uni Arge Akranes, Jákup Mikkelsen Herfølge og Johan Byrial Hansen OB.



**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 16 | 10 | 4 | 2 | 35 | 18 | 17 | 34 |
| 2 | VB | 16 | 10 | 4 | 2 | 34 | 20 | 14 | 34 |
| 3 | B68 | 16 | 10 | 1 | 5 | 39 | 27 | 12 | 31 |
| 4 | B36 | 16 | 9 | 0 | 7 | 46 | 23 | 23 | 27 |
| 5 | KÍ | 16 | 7 | 3 | 6 | 35 | 23 | 12 | 24 |
| 6 | NSÍ | 16 | 7 | 3 | 6 | 35 | 27 | 8 | 24 |
| 7 | GÍ | 16 | 6 | 2 | 8 | 29 | 34 | -5 | 20 |
| 8 | B71 | 16 | 4 | 2 | 10 | 23 | 29 | -6 | 14 |
| 9 | FS Vágar | 16 | 3 | 2 | 11 | 17 | 44 | -27 | 11 |
| 10 | Sumba | 16 | 3 | 1 | 12 | 14 | 62 | -48 | 10 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/Str. | 16 | 11 | 3 | 2 | 47 | 21 | 26 | 36 |
| 2 | ÍF | 16 | 8 | 6 | 2 | 37 | 19 | 18 | 30 |
| 3 | TB | 16 | 8 | 3 | 5 | 46 | 39 | 7 | 27 |
| 4 | B36 | 16 | 7 | 2 | 7 | 32 | 31 | 1 | 23 |
| 5 | NSÍ | 16 | 7 | 2 | 7 | 26 | 29 | -3 | 23 |
| 6 | KÍ | 16 | 5 | 5 | 6 | 26 | 33 | -7 | 20 |
| 7 | GÍ | 16 | 5 | 4 | 7 | 29 | 38 | -9 | 19 |
| 8 | HB | 16 | 5 | 2 | 9 | 41 | 50 | -9 | 17 |
| 9 | LÍF | 16 | 4 | 4 | 8 | 20 | 27 | -7 | 16 |
| 10 | Royn | 16 | 2 | 5 | 9 | 16 | 33 | -17 | 11 |

**Støðan, 3. deild menn**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 17 | 11 | 2 | 4 | 62 | 35 | 27 | 35 |
| 2 | B36 | 17 | 10 | 2 | 5 | 47 | 24 | 23 | 32 |
| 3 | AB | 17 | 10 | 1 | 6 | 75 | 42 | 33 | 31 |
| 4 | B71 | 17 | 10 | 0 | 7 | 57 | 46 | 11 | 30 |
| 5 | VB | 17 | 9 | 1 | 7 | 48 | 45 | 3 | 28 |
| 6 | B68 | 17 | 5 | 5 | 7 | 42 | 41 | 1 | 20 |
| 7 | TB | 17 | 6 | 2 | 9 | 47 | 48 | -1 | 20 |
| 8 | ÍF | 17 | 5 | 2 | 10 | 42 | 54 | -12 | 17 |
| 9 | FS Vágar | 17 | 5 | 2 | 10 | 47 | 64 | -17 | 17 |
| 10 | KÍ | 17 | 5 | 1 | 11 | 42 | 110 | -68 | 16 |

**Støðan, 1. deild kvinnur**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 9 | 7 | 0 | 2 | 42 | 11 | 31 | 21 |
| 2 | HB | 9 | 7 | 0 | 2 | 27 | 14 | 13 | 21 |
| 3 | VB | 9 | 6 | 1 | 2 | 43 | 15 | 28 | 19 |
| 4 | B36 | 9 | 3 | 1 | 5 | 13 | 17 | -4 | 10 |
| 5 | NSÍ | 8 | 2 | 0 | 6 | 15 | 20 | -5 | 6 |
| 6 | Skála | 8 | 0 | 0 | 8 | 2 | 65 | -63 | 0 |

# 1. deild byrjar 14.45



*Allir dystirnir í fremstu deildini verða nú leiktir samstundis*

Jákup Mørk

Hetta verður sjálvandi gjørt við tí fyri eyga, at tað ikki skal bera til hjá nøkrum liði at leggja seg eftir einum ávísum úrsliti, tí úrslitið av øðrum dystum er kunnugt áðrenn dystarlok.

At allir dystirnir sostatt verða settir til kl. 14.45 kemst av, at fyri at toftamenn skulu sleppa norður aftur við Smyrli sunnudagin, er hetta avgjørt seinasta freist at seta dystin í gongd.

At dystirnir skulu leikast samstundis, er eisini galdandi í hinum deildunum, og tí verður leikt soleiðis:

1. deildardystir hjá monnum verða leiktir sunnudagin kl. 14.45

2. deildardystir verða leiktir leygardagin kl. 15.00.

3. deildardystir verða leiktir leygardagin kl. 13.00.

1. deildardystir hjá kvinnum verða leiktir sunnudagin kl. 12.45

### 3. deild endar

Annars er talan um seinasta umfar í kappingini hjá 3. deild.

Her hevur Skála longu tryggja sær gullmerki og uppflyting, meðan spenningur framvegis er stórur. Bæði um silvurmerkini og um næsta uppflytingarsessin.

B36, AB og B71 kunnu øll vinna silvurmerki, meðan dysturin um rættin til uppflytingardyst stendur millum AB, B71 og VB. B36 hevur lið í næstbestu deildini, og kann tí ikki flyta upp.

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

24.09 GÍ-FSV — Jens Petur Brattalíð
24.09 VB-B68 — Niklas á Líðarenda
24.09 HB-B36 — Lassin Isaksen
24.09 NSÍ-Sumba — Suni Johansen
24.09 KÍ-B71 — Petur Hansen

**2. deild menn**

23.09 KÍ-TB — Jákup Martin Kjeld
23.09 LÍF-GÍ — Sjúrður Norðbúð
23.09 HB-B36 — Lars Müller
23.09 EB/Streymur-ÍF — Tummas Pauli Olsen
23.09 Royn-NSÍ — Jens Petur Brattalíð

**3. deild menn**

23.09 ÍF-FS Vágar — Hjalti Gleðisheygg
23.09 VB-B68 — Zoran Mancic
23.09 AB-B36 — Tommy O. Joensen
23.09 Skála-TB — Rúni Gaardbo
23.09 KÍ-B71 — Páll Rói Poulsen

**1. deild kvinnu**

24.09 B36-NSÍ — Ólavur Weihe
24.09 VB-HB — Petur Erhard Kjærbo
24.09 Skála-KÍ — Aron Olsen